

Matarsteðgur. Vaksin og børn fáa mat



Børnini fáa okkurt gott



Tey kunnu eisini hava tað stuttligt



Børnini á veg eftir vatni



Stella og Petur Zachariassen saman við yngstu dóttur teirra, Kezia

fólk, har øll sova á gólvinum. Serliga eru umstøðurnar vánaligar, tí tá ið tað regnar, er alt eitt runudýki inni í húsinum.

Vit eru byrjað eina innsavning við stuðlum til at gera hetta føroyska prosjektið her í Kenya.

Vit eru sera takksom fyri stuðulin úr Føroyum, men enn eru vit ikki rokkin á mál.

Her er málið ikki at geva fólkinum fisk, men at læra tey at fiska, sum orðatakið sigur. Sum sagt, so hava vit ymisk prosjekt koyrandi, har m.a. nógvir føroyskir stuðlar hjálpa børnum at ganga í skúla. Skúlagongdin er ókeypis, men uniformar, bøkur o.s.v. kosta umleið 150 kr um mánaðin, og tað hevur tað vanliga fólkið ikki ráð til her. Her hugsa øll um seg og sítt fyri at yvirliva, so tað er ikki lætt at hjálpa, tá ið neyðin er so stór, sum hon er.

Vit vóru herfyri í bygduni Piavi og høvdu eitt døgðuraball fyri teimum, ið koma á møtini, sum vit hava. Vit fingu hjálp við nøkrum stuðlum til at keypa teimum kjøt til døgurða, og tað hevði meginparturin av teimum ikki roynt áður í sínum lívi, altso at eta kjøt. So gleðin var sera stór tann sunnudagin.

Herfyri fingu vit hjálp frá føroyskum stuðlum til at keypa 13 familjum ein 100 litur dunk í part. Av tí at tað er sera trupult at skaffa vatn, má man hava dunkar standandi undir takrennunum fyri at samla vatn saman. Ofta mugu tey so taka vatnið úr ánni, sum rennur umleið tríggjar kilometrar burtur frá bygduni. At drekka hetta vatnið ber allar møguligar sjúkur við sær, tí her drekka eisini neyt og seyður. Ofta liggja eisini deyð djór í ánni.

Einki av hesum ber til uttan stuðlar. Um onkur hevur hug at stuðla hesum, eru tey vælkomin til tað. Til ber m.a. at kontakta Stellu á Facebook ella á teldupostadressuni stellaz@olivant.fo. Tá ið alt kemur til alt, so er neyðin sera stór. Men sum tað stendur í Bíbliuni, so eru markirnar klárar at heysta, og tað er m.a. tað sum heldur okkum koyrandi, siga Stella og Petur Zachariassen.